Álit

í

løgtingsmáli nr. 33/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. (Lestrarstuðul frádrigin í fyritíðarpensjón)

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, hevur lagt málið fram 30. september 2020, og eftir 1. viðgerð 8. oktober 2020 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 20. oktober og 3. og 24. november 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri MEGD saman við Sinnisbata, Javna og Diabetesfelagnum, Fakfelagssamstarvið saman við Samtaki, MFS, og við landsstýrismannin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur saman við Almannaverkinum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Uni Rasmussen, Edva Jacobsen, Erhard Joensen og Jóhan Eli Poulsen) tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Sirið Stenberg, Hervør Pálsdóttir og Aksel V. Johannesen) mælir frá at samtykkja uppskotið við hesum viðmerkingum:
Lesandi verða mótroknað í a-inntøku eftir lóg um lestrarstuðul. Fyritíðarpensjonistar, sum fara undir lestur, eiga at javnsetast við onnur lesandi, tá tað kemur til mótrokning í lestrarstuðli. Tá stórur partur av fyritíðarpensjónini er skattafrí og tískil ikki kann samanberast við vanliga skattskylduga inntøku, so eigur fyritíðarpensjónin í mótrokningarhøpi at umroknast til eina vanliga skattskylduga inntøku. Verður hetta gjørt, hevði fyritíðarpensjónin verið mótroknað eins og øll onnur inntøka hjá lesandi og á tann hátt høvdu lesandi fyritíðarpensjonistar og onnur lesandi, sum hava arbeiði við síðuna av lesnaðinum, verið javnsett.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 1. desember 2020

Uni Rasmussen
formaður

Sirið Stenberg
næstformaður

Aksel V. Johannesen

Hervør Pálsdóttir

Edva Jacobsen

Jóhan Eli Poulsen

Erhard Joensen